Skulu giftast 14. mai næsta ár

Fríðrikur krúnprinsur og Mary Donaldson vórðu trúlovað í gjár. Samstundis varð kunngjørt, at tey skulu giftast tann 14. mai næsta ár.

KONGSHÚSIÐ
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Fríggjadagin tann 14. mai næsta ár verður hátíðardagur í danska kongaríkinum, tí tá verða Fríðrikur krúnprinsur og Mary Donaldson vígd í Vor Frue kirke í Keypmannahavn.

Tað kunngjørdi kongshúsið fyrrapartin í gjár. Samstundis varð fráboðað, at tað verður biskuppurin í Keypmannahavn, Erik Norman Svendsen, sum skal víga tey bæði.

Fríðrikur krúnprinsur og avstralska unnusta hansara vórðu alment trúlovað í gjár, eftir at Margretha drotning hevði kunngjørt fyri stjórnini, at hon hevði játtað teimum at ganga í hjúnalag. Frammanundan hevði hon boðað forsætisráðharranum frá avgerð síni, og týsdagin kunnaði hann Fólkatingið um tað.

Á middegi í gjár komu tey bæði út á svalan á Amalienborg og vístu seg fyri fyrstu ferð alment fyri danska fólkinum. Seinnapartin var tíðindafundur, og í gjárkvøldið vóru tey bæði til døgurða saman við hinum í kongshúsinum, stjórnini, formanninum í Fólkatinginum og formonnunum í teimum politisku flokkunum.

Mary Donaldson er limur í presbyteronsku kirkjuni, men hevur játtað at fara upp í ta evangelisku luthersku kirkjuna. Hon er bæði avstralskur og bretskur ríkisborgari, men hevur søkt um danskan ríkisborgararætt. Hóast mary Donaldson nú er trúlovað danska krúnprinsinum, fær hon einki heiti. Tað verður ikki fyrr enn, tá tey giftast. Tá verður hon Mary krúnprinsessa.

Symfoniskonsert

Føroya Symfoniorkestur konsert í Norðurlandahúsin um sunnudagin 26. oktober klokkan 1600. Á skránni eru verk eftir Dimitri Sjostakovitj og Pjotr Tjaikovskij, og er Jóhannes Andreasen solistur á klaverinum. Bernhard Wilkinson er dirigentur

TÍÐINDASKRIV
frá Føroya Symfoniorkestri

Tann 8. mai í ár hevði Norðurlandahúsið stórt hátíðarhald í sambandi við, at húsið varð 20 ár. Ein annar føroyskur mentanarstovnur fylti samstundis 20 ár og var við til at hátíðarhalda javnaldurin við stórfingnari konsert, og var og er tað Føroya Symfoniorkestur. Hetta orkestur hevur livað sítt stilla lív í samfelagnum og við hjálp og stuðuli ymsa staðni frá kunnað hildið meira enn seksti konsertir hesi árini. Hugaligt er, at fleiri av teimum, sum í dag mynda orkestrið, hava spælt við í øll hesi 20 árini.

Orkestrið heldur fram at hátíðarhalda 20ára føðingardagin við eini stórfingnari konsert tann 26. oktober. Henda konsertin verður stjórnað av Bernhardi Wilkinson, sum í løtuni býr í Føroyum. Hann er annars hálvur føroyingur. Mamman var úr Sumba; hon giftist bretskum hermanni; sum var tónleikari og var í nógv ár leiðari av BBC Singers. Sjálvur er Bernhard uppvaksin sum kórdrongur í Westminster Abbey. Men hann er útbúgvin floytuspælari, og í nógv ár hevur hann verið solofloytunistur í Sinfansljómsveit Íslands og hevur samstundis verið varadirigentur dirigentur í hesum orkestri. Tað var hann, sum stjórnaði Sinfansljómsveit Íslands í fyrstu føroysku symfoniina hjá Sunleifi Rasmussen, Oceanic Days.

Á konsertini 26. oktober verða spæld verk eftir Sjostakovitj og Tjaikovskij. Konsertin byrjar við eini festouverturu av Dimitri Sjostakovitj, sprækin og sera ahugaverdur rútmiskur musikkur. Síðani verður okkara framúr pianistur, Johannes Andreasen, solistur í klaverkonsert av sama komponisti. Eitt verk fyri snidlingar, og sum má hava áhuga fyri øll tey, sum hava tokka til klaverspæl. Seinasta verkið á skránni verður 5. symfoni av Tjaikovskij. Ein av hansara kendastu symfoniunum, full av vøkrum løgum, sum Tjaikovskij jú var ein meistari í at skapa. Hetta er helst stórsta, og mest krevjandi avbjóðingin, orkestrið her hevur átikið sær.

Sangkvøld í Frelsunarherinum og lega í Norðursællandi

KRISTNASTOVA
Tíðindaskriv

Nú heystið eisini er komið til Danmarkar við munandi kaldari hitagradrum, eru innandurað tiltøkini fleiri í tali - eisini hjá Kristnastovu, sum næstu tvey vikuskiftini skipar fyri tveimum ymiskum tiltøkum.

Fjølbroytt sangkvøld

Sunnukvøldið 12. oktober kl. 19 verður eitt føroysktdanskt sangkvøld í hølunum hjá Frelsunarherinum í Valby, Langgade 12.

Hetta kvøldið fer orkestrið hjá Frelsunarherinum í Valby at spæla. M.a. fara tey at spæla nakrar føroyskar sangir. Ung úr Kristnastovu fara at syngja, og harumframt verður vitjan av brøðrunum Jóannes og Ólavi á Váli, sum syngja nakrar duettsangir. Sungið verður eisini í felag, bæði eldri og nýggjari sangir, sum mong munnu kenna. Endað verður við stuttum boðskapi av Øssur Berghamar.

Møtið fer fram á donskum, hóast nógvir av sangunum verða føroyskir. Hetta verður gjørt, so bæði danir og føroyingar skulu kenna seg vælkomnar. Og fyrireikararnir vóna, at fólk heima í Føroyum siga skyldfólki og vinfólki frá hesum tiltøki.

Lega í Norðursjællandi

Tað hevur verið fastur siður hjá Kristnastovu gjøgnum mong ár at skipa fyri legu í Norðursjællandi í heystfríðíni. Soleiðis verður eisini í ár, tí í døgunum 16 til 19. oktober verður lega á Nordsjællands Efterskole. Skúlin liggur tætt við býin Helsinge og er ein góður karmur um eitt tiltak sum hetta.

Undir leguni vera sum vant bibliutímar og samkomur við ymiskum innihaldi. Gestur á leguni verður Poul Færø, sum fer at tala á bibliutímunum. Men eisini vera serstakar samkomur skipaðar fyri børnini. Og høvi verður til at ítrótt og spøl bæði innan- og uttandurað.

Tey, sum ynskja at vera við, kunnu ringja til Kristnastovu , telefon 32 55 18 09 ella senda ein teldupost til kristnastova@get2net.dk - helst skjótast gjørligt.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Joen H. Andreassen 70 ár



Í dag, 9. oktober, fyllir Joen H. Andreassen í Havn 70 ár. Hann er betur kendur sum »dómarin« ella nú sum »umboðsmaðurin«.

Joen H. Andreassen er ættaður av Strondum, sonur Kristian og Fridu Andreassen. Pápin doyði í 1972 og mamman í 1941. Jógvan er giftur Elisabeth, sum er fysioterapoutur. Hon er dóttir Clement og Nicolinu Petersen. Hann tók studentsprógv í Havn í 1952 og løgfrøðiligt embætisprógv í 1958 og starvaðist eitt skifti sama árið hjá Føroya Landsstýri. Í oktober í 1958 fór hann í starv í Løgmálaráðnum í Keypmannahavn til hann í 1960 gjørdist dómarafulltrúi í Roskilde. Í 1964 gjørdist hann dómarafulltrúi í Havn, í 1969 rættarasessor og tann 1. desember í 1977 tók hann við sum sorinskrivari – og frá 1994 sum fyrisitingarligur sorinskrivari.

Sum sorinskrivari hevði hann limaskap í ymsum nevndum, var m. a. formaður í Vanlukkutryggingarráðnum, Yvirfriðingarnevndini og Leigunevndini í Tórshavn.

Hann varð valdur til fyrsta løgtingsins umboðsmann, tá hetta embætið varð sett á stovn. Hann er valdur fyri tíðarskeiðið 1. januar 2001 til 31. desember í 2005.

Johanna Danielsen 65

Í dag, 9. november, fyllir Johanna Danielsen í Havn 65 ár. Hon er ættað úr Oyndarfirði, dóttir Augustu Gaard úr Oyndarfirði og Jóan Petur Petersen av Norðoyri.

Johanna tók lærarapróg í Havn í 1962. Hon var síðani lærari í Sørvági í eitt ár, á Glyvrum í 3 ár, á Tvøroyri í eitt ár og á Venjingarskúlanum síðani 1971.

Hon giftist við Petur Martin Danielsen úr Porkeri.

Ein heilsan

Hin 9. oktober fyllir ein kendur havnarmaður, Petur Petersen – Petur hjá Adrian í Rituvík, 75 ár.

Síðan Petur kom til mans, hevur hann fingist við mangt. Sum so mangur føroyingur baldist hann á sjónum í mong ár. Var í Norðsjónum, undir Íslandi og í Grønlandi. Tá hann fekk sær konu og børnini fóru at koma, legðist hann upp á land og fór undir at smíða. Fekk sær tekniska útbúgving og starvaðist í seksti- og sjeytiárunum sum timburmeistari. Sum tann hegnismaður hann er, kom mangt vælaverk frá hansara hond.

Í áttatiárunum fór heilsan at bila. Hann fall tó ikki í fátt, men fór undir innrammingarvirki. Í Rammukjallaranum í Jónas Broncksgøtu, har bæði lærur og leikur komu á gátt, var mong hugnalig løtan.

Listarligu gávur Peturs komu til sjóndar við mongum framsýningum av tekningum, akvarellum og pastellum, bæði í Smiðjuni í Litluvík og í SMS, sum mong vilja minnast.

Í dag býr Petur í Struer við hin vakra Limfjørðin. Ikki er óvanligt at síggja Petur á ferð í náttúruni við skitsublokkinum undir armi.

Við ynski um framhaldandi mong góð ár. Kæri vinur, hjartaliga tillukku ynskja

vinfólk

9. oktober

Dionysius, deyður umleið 258. Varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmartre, ið merkir *martýrfjallið.* Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har varð kirkjan St. Denis bygd. – Sí 6. juli.

Símun av Skarði deyður 1942.

Ein heilsan til mammu mína, Solborg Joensen í Sandavági, á 85 ára degnum

Sveima sum támið nú tankar á flog
hátt yvir tindum og fjøllum
Skaparans verk ber mær tigandi boð
um alveldis mátt yvir øllum

Mín hugur hann leitar til farna tíð
tá sum børn vit spældu glað og fríð
altíð mamma heima hjá okkum var
kendu ei til dagpleygu og barnagarð.

Allar tær ríku løtur tú okkum gav
fylgja okkum vilja til livssól fer í kav
tá grønt var gras vit róku neyt í haga
mamma stegðaði á - segði - hoyr- fuglaljóðið glaða.

Fimm børn sekstan ommubørn hava fingið
tríoggtjúgu langommubørn eru komin við
væl fylgt við hvussu hjá øllum hevur gingið
hava okkum øll við tykkara lið.

Alt mamma hevur nappað, kara, spunnið
elska at hoyrt vatnið í ánni runnið
teir túsundtals fermetrar hon hevur bundið
høvdu rokkið nógvar ferðir um sundið.

Bønirnar allar tú til Harran bað
hava borið okkum heilt til hendan dag
virðir hetta eru ongin kann taka okkum frá
við songarstokkin mamma á knøum lá.

Nú dagur fer at halla og tað mót kvøldi ber
takkarkvøðu góða mamma vit tær senda her
alt tú okkum lærdi alt tú okkum gav
aldri kann tað tærast tíðartonnum av.

Hjartaliga tillukku í dag skal ljóða
til tín okkara móðir góða
takk fyri lívið tú okkum gav
fyri barlast góða og førning yvir lívsins hav.

Góða mamma tú hevur góða stríðið strítt
gævi tú mást fáa lívskvøldið blítt

Elvina

Nýggj nevnd hjá tannlæknum

Føroya Tannlæknafelag hevði aðalfund á Hotel Hafnia 3. oktober 2003. Øll nevndin bleiv afturvald uttan mótvalevni.

Kaj Anthoniussen er formaður, Unn Jacobsen, skrivari, og Unnur Jensen er kassameistari.